Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	18/03/2024
Mál nr.:	24/03459
Málsviðgjørt:	OYS
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	16.02.2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum
(Hægri fíggjarkarmur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum verður § 1, 2. pkt. orðað soleiðis:
“Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 37 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, umframt útreiðslur til at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við heimild í løgtingslóg nr. 83 frá 22 juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum er gongd sett á arbeiðið við at høvuðsumvæla skúlabygningarnar á Frælsinum í Tórshavn (fyrrverandi Læraraskúlin og Venjingarskúlin/Skúlin á Fløtum). Talan er um tekjuna á lon 5, ið er liðug, og útveggirnar, har arbeiðið er byrjað, umframt prosjektering av restini av arbeiðinum við lon 5. Hartil er eitt fyribils parkeringsøki á pørtum av fløtuni á Frælsinum gjørt.

Tá Løgtingið samtykti galdandi løgtingslóg, varð avgjørt, at lógin bert skal fevna um tekjuna og útveggirnar á lon 5 og prosjektering av restini av arbeiðinum við lon 5, umframt parkeringsøkið av pørtum á fløtuni á Frælsinum. Løgtingið viðmerkti, at áðrenn restin av umvælingararbeiðinum av lon 5 verður gjørt, skal uppskot um broyting í løgtingslógini leggjast fyri Løgtingið, soleiðis at lógin fevnir um alt umvælingararbeiðið av lon 5.

Nú restin av umvælingararbeiðinum hevur verið í útboði, og vinnarar eru funnir til tær seks ymisku fakarbeiðstøkurnar til inniarbeiðið, verður hetta lógaruppskot tí lagt fyri Løgtingið. Fakarbeiðstøkurnar, sum talan er um, eru:

1. Timbur- snikkara- og niðurtøkuarbeiði,
2. málara- og múraraarbeiði,
3. gólvarbeiði,
4. HVS og ventilatsjónsarbeiði,
5. EL arbeiði, og
6. kloakkarbeiði.

Afturat handverkaraútreiðslunum eru eisini útreiðslur til at keypa innbúgv afturat verandi innbúgvi. Ætlanin er annars at brúka innbúgvið, sum stendur í hølunum, sum flutt verður úr, tá ið flutt verður í lon 5.

Áðrenn farið verður víðari við verkætlanini at høvuðsumvæla restina av skúlabygningunum á Frælsinum, er ætlanin at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar. Henda skal taka støði í tí vitan, sum er uppbygd undir prosjekteringini av lon 5, tørvum og krøvum hjá Setrinum og heildarætlanini fyri Kampus. Heildarætlanin fyri skúlabygningarnar á Frælsinum er partur av hesum lógaruppskotinum.

Tá heildarætlanin er klár, og stórur partur av lon 5 er umvældur, er ætlanin at fara víðari við prosjektering av næstu lonunum. Við hesum leisti tryggja vit okkum, at tær røttu loysnirnar frá lon 5 verða endurnýttar, og at óvissurnar verða minni vegna royndirnar frá lon 5. Av tí sama væntast prosjekteringin av teimum næstu lonunum ikki at verða líka umfatandi, sum hon hevur verið fyri lon 5.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið, sum hetta lógaruppskot fevnir um, er hægri enn fíggjarkarmurin í galdandi løgtingslóg. Fíggjarkarmurin verður tí hækkaður við muninum, sum er 13 mió. kr.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið setti í august 2023 stýrisbólk til at taka avgerðir í verkætlanini og fylgja við í, at arbeiðið gongur eftir ætlan, og at fíggjar- og tíðarætlan halda seg innanfyri

tað ásetta. Stýrisbólkurin skal sum partur av hesum m.a. góðkenna kostnaðarætlanina/raðfestingina av givnu játtanini til verkætlanina og hava eftirlit við fíggjarætlanini og verkætlanarstýringini og fylgja við framdráttinum í verkætlanini. Stýrisbólkurin er mannaður við leiðsluumboðum frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Fróðskaparsetrinum og Landsverki.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum. Sambært § 1 í galdandi løgtingslóg kunnu byggiútreiðslurnar í mesta lagi vera 24 mió. kr. Løgtingið hevur tó avmarkað heimildina viðvíkjandi fyrsta byggistigi til bert at fevna um tekjuna og útveggirnar á lon 5 og prosjektering av restini av arbeiðinum við lon 5, umframt eitt fyribils parkeringsøki á pørtum á fløtuni á Frælsinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Tá Løgtingið samtykti galdandi løgtingslóg, varð samtykt, at lógin bert skal fevna um tekjuna og útveggirnar á lon 5 og prosjektering av restini av arbeiðinum við lon 5, umframt eitt fyribils parkeringsøki á pørtum av fløtuni á Frælsinum. Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at seta gongd á umvælingina av restini av lon 5, ið fevnir um inniarbeiðið.

Umframt nevnda umvælingararbeiði verður eisini heimilað landsstýrismanninum at halda útreiðslur til at keypa innbúgv afturat verandi innbúgvi til lon 5, og at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

Við galdandi løgtingslóg hevur landsstýrismaðurin heimild at brúka í mesta lagi 24 mió. kr. til høvuðsumvælingina. Við hesum lógaruppskotinum verður upphæddin hækkað við 13 mió. kr. úr 24 mió. kr. til 37 mió. kr., ið svarar til kostnaðarmetingina hjá Landsverki, nú hesin parturin av verkætlanini er bjóðaður út, og Landsverk hevur gjøgnumgingið innkomnu tilboðini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tá galdandi løgtingslóg varð samtykt, samtykti Løgtingið, at lógin bert skal fevna um tekjuna og útveggirnar á lon 5 og prosjektering av restini av arbeiðinum við lon 5, umframt fyribils parkeringsøki á pørtum av fløtuni á Frælsinum. Áðrenn restin av umvælingararbeiðinum á lon 5 verður gjørt, ið er inniarbeiðið, skal galdandi løgtingslóg tískil víðkast til eisini at fevna um hetta arbeiði.

Løgtingslógin heimilar eisini landsstýrismanninum at halda útreiðslur til at keypa innbúgv afturat verandi innbúgvi til lon 5, og at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

Fyri at fremja arbeiðið, sum lógaruppskotið fevnir um, er neyðugt at hækka galdandi fíggjarkarm við 13 mió. kr.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið, Landsverk og Fróðskaparsetrið. Lógaruppskotið er ikki lagt fram til almenna hoyring.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landsverk hevur havt restina av umvælingararbeiðinum av lon 5 í útboði, og við støði í innkomnu tilboðunum metir Landsverk, at kostnaðurin av at høvuðsumvæla lon 5 verður 34,1 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv. Eitt fyribils parkeringsøki er gjørt á pørtum av fløtuni á Frælsinum, og ein heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum skal gerast. Samlaði kostnaðurin, sum løgtingslógin fevnir um, er sostatt 37 mió. kr. Kostnaðarætlanin fyri verkætlanina sær soleiðis út:

	Kostnaður
Handverkaraarbeiði	
Tekja	2.087.000
Framsíður	6.587.000
EL - inniarbeiði	2.677.000
Kloak - inniarbeiði	2.050.000
Timbur - inniarbeiði	5.020.000
Málara - inniarbeiði	1.320.000
Gólv - inniarbeiði	659.000
HVS og Vent. - inniarbeiði	3.791.000
Niðurtøka - vandamikið tilfar	300.000
Til samans	**24.491.000**
Prosjektering og fyrireiking	
Verkætlanarleiðsla	234.000
Byggileiðsla	1.330.000
Innanhýsis ráðgeving	243.000
HTU - samskipara	100.000
Prosjektering	4.800.000
Fakeftirlit	635.000
Til samans	**7.342.000**
Innbúgv	140.000
Óvissur - írestandi arbeiði	2.100.000
Lon 5 til samans	**34.073.000**
Heildarætlan	200.000
Fyribils parkeringsøki	2.727.000
Verklagslóg til samans	**37.000.000**

Høvuðsumvælingin av lon 5 varð í apríl 2023 mett at kosta 31,3 mió. kr., harav handverkaraútreiðslurnar vórðu mettar til 23,7 mió. kr. Tá ið nú tilboðini eru kend, og tekjan er liðug, eru handverkaraútreiðslurnar 24,5 mió. kr. ella 0,8 mió. kr. meira enn metingin frá apríl 2023.

Av kostnaðinum á 31,3 mió. kr. varð prosjektering og ráðgeving mett til 5,2 mió. kr., men Landsverk væntar, at útreiðslurnar enda á 7,3 mió. kr. Sambært Landsverki kostar prosjektering og ráðgeving meira, tí at tilgongdin hevur verið longri, tí talan er um ta fyrstu

lonina, og har eru loysnir innhugsaðar, sum dekka fleiri av teimum komandi lonunum, t.d. kanningar av vandamiklum evnum í øllum bygninginum, flyting av servararúmi og starvsfólkarúmi frá lon 5 til aðrar lonir, EL-loysnir, brunaloysnir og HVS og ventilatiónsloysnir, har allur bygningurin má havast í huga.

Kostnaðurin fyri lon 5 er 34,1 mió. kr. ella 2,8 mió. kr. meira enn áður mett. Harav eru handverkaraútreiðslurnar 0,8 mió. kr. hægri, og útreiðslurnar til prosjektering og ráðgeving 2,1 mió. kr. hægri, innbúgv 0,1 mió. kr., meðan óvissan er 0,2 mió. kr. lægri.

Umframt at gera høvuðsumvælingina av lon 5 lidna, verður eisini farið undir at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum. Hetta arbeiði metir Landsverk fer at kosta 0,2 mió. kr., ið er partur av hesum lógaruppskotinum.

Aðrar útreiðslur eru fyribils parkering á pørtum av fløtuni á Frælsinum fyri 2,7 mió. kr., ið er liðug. Í apríl 2023 metti Landsverk, at fyribils parkeringsøki fór at kosta 2 mió. kr., men nú arbeiðið er liðugt, er endaligi kostnaðurin 2,7 mió. kr. Orsøkin til økta kostnaðin er, at nøgdirnar av tilfari, sum er grivið omanav, eru størri enn væntað, og tí at tað aftaná vísti seg at verða neyðugt at seta ljós upp á økinum.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið, sum hetta lógaruppskot fevnir um, er sostatt 37 mió. kr., meðan galdandi løgtingslóg heimilar landsstýrismanninum at nýta í mesta lagi 24 mió. kr. Tískil er neyðugt at hækka fíggjarkarmin við 13 mió. kr.

Fram til árslok 2023 eru brúktar 3,3 mió. kr. til lættari ábøtur á lon 4 og lon 7 og 0,4 mió. kr. til tinglýsingargjald og tingslýsingaravgjald. Tilsamans 3,7 mió. kr., sum ikki er partur av løgtingslógini.

Til høvuðsumvælingina av lon 5 eru fram til árslok 2023 brúktar 7,8 mió. kr. og 2,7 mió. kr. til fyribils parkering. Játtaðar eru 18 mió. kr. í 2024. Framfluttar verðar 12,6 mió. kr. í óbrúktari játtan, og er tøka játtanin tískil 30,6 mió. kr. í 2024. Tað mesta av arbeiðinum verður gjørt í 2024, men nakað av arbeiðinum verður væntandi ikki liðugt fyrr enn í 2025.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur jaliga ávirkan á vinnuna vegna økt ráðgevingar- og byggivirksemi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Skúlabygningarnir á Frælsinum verða høvuðsumvældir og útbygdir samsvarandi galdandi regluverki innan bygging og halda seg til ávísa burðardygd í bygging, t.d. í mun til nútímans orkukrøv. Ein burðardygdarætlan verður ment í sambandi við verkætlanina.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið er liður í at fremja eina samlaða kampusverkætlan á Frælsinum í Tórshavn. Lógaruppskotið fer tískil at hava eina jaliga ávirkan á virksemið á staðnum, bæði í

byggitíðarskeiðnum og ikki minst, tá verkætlanin verður liðug. Lógaruppskotið fer tó eisini at hava jaliga ávirkan á Føroyar sum heild, tí lógaruppskotið er við til at betra um karmarnar hjá Fróðskaparsetrinum, ið er okkara universitet, hvørs aðalmál er burðardygg menning av føroyska samfelagnum, har gransking og undirvísing eru kjarnin í virkseminum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Tá ið skúlabygningarnir eru høvuðsumvældir og nútíðargjørdir, fær tað jaligar avleiðingar fyri lesandi og starvsfólk á Fróðskaparsetrinum, tí fysisku karmarnir kring Fróðskaparsetrið verða betri.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

Fólk, sum hava ella bera rørslu-, hoyri- og sjónbrek, skulu kunna nýta hølini í skúlabygningunum. Mett verður tí, at lógaruppskotið er í samsvari við ST sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek (Breksáttmálin).

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar, og ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, útpanting, ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at seta gongd á restina av høvuðsumvælingini av lon 5.

Landskassin fíggjar verkætlanina at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum í Tórshavn. Tað er Landsverk, sum vegna landsstýrismannin fær verkætlanina og játtanina at umsita sum byggiharri.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Broytingin av § 1 í løgtingslógini ber við sær, at mesta upphæddin, ið landsstýrismanninum verður heimilað at nýta til høvuðsumvæling og umbygging, hækkar úr 24 mió. kr. til 37 mió. kr., svarandi til eina hækking upp á 13 mió. kr. Eisini er innbúgv nú partur av verkætlanini, og ein heildarætlan verður gjørd fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

Til § 2
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 16. apríl 2024

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Myndir av lon 5
Fylgiskjal 3: Heildarætlan 2018, Færøernes universitet – Strategisk Campusplan